# Bíða eftir eykaluti

**So leingi sum bógportið á Reginu Palticu ikki kann latast upp og aftur, fara bilarnir umborð og í land gjøgnum hekkuportið eins og á Smyrli**



*Regina Baltica legði frá landi við opnum bógportri, men vendi inn aftur, tá ið tað ikki fekst niður*
Mynd: Grethard Poulsen

Randi Jacobsen

Tá ið avloysaraskipið hjá Smyrli, Regina Baltica, leygarmorgnin legði frá landi úr Havn, fekst bógportrið ikki aftur. Skipið fór frá, men tá ið tøknin ikki riggaði, vendi Regina Baltica aftur.

– Tað var eingin vandi á ferð, tí rampan innan fyri var tøtt, men vit fóru iki at taka nakrar kansir, sigur Conrad Gaard Joensen, rakstarleiðari á Strandferðsluni.

Arbeitt varð allan dagin upp á bógportrið, men tað fekst ikki at rigga, og tí fór Regina Baltica ikki til Suðuroyar fyrr enn seint um kvøldið. Bógportrið var aftur, og bilar komu umborð og í land gjøgnum hekkuportrið. Smyril hevur eisini bara hekkuportur.

Conrad Gaard Joensen sigur, at eykaluturin til bógportrið er bílagdur, men tað tekur nakrar dagar at fáa hann til Føroya. Bíleggingin gongur gjøgnum reiðaríi hjá Reginu Balticu.

# Portugisarnir hava fingið sítt

**Marner Lisberg vil ikki hava hangandi á sær skuldsetingar um, at teir báðir portugisarnir, sum sigldu við Suðringi, ikki hava fingið ta hýru, sum framman undan var avtalað**

Leo Poulsen

Fyri smáum trimum vikum síðani setti formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, fram grovar ákærur móti reiðaranum á Suðringi, Marner Lisberg, har hann samanlíknaði viðferðina av tveimum portugisum við mafia-metodur at lokka gleðisgentur til vesturheimin.

Jan Højgaard vildi vera við, at portugisarnir ikki høvdu fingið eitt oyra í hýru, og ikki fyrr enn Fiskimannafelagið kom upp í leikin, fingu menninir nakrar fáar krónur, men als ikki nóg mikið at rinda fyri ferðina heimaftur.

Hesum vísti reiðarin á Suðringi, Marner Lisberg tó aftur, men hann heldur framvegis, at málið hongur í leysum lofti, og at fólk hava eina fatan av, at hann ikki hevur hildið sínar skyldur móti portugisarunum.

Eg tími ikki at hava slíkt hangandi oman yvir mær, og tí leggi eg fram alment peningaflytingarnar til teir báðar portugisarnar, so fólk kunnu síggja, at tað er ikki hald í ákærunum hjá Jan Højgaard móti mær, sigur Marner Lisberg.

Reiðarin sigur, at hann hevði gjørt avtalu við portugisarnar um eina mánaðarliga hýru á 1.500 evrur til útgjaldingar, og tá skuldi reiðaríið rinda skattin. Sum sæst á kvittanunum hava portugisarnir fingið hesar pengar, annan mánaðan sum bankaflyting og hin í hondina, so sum kvittanirnar vísa.

Tá slík úttalilsi koma frá formanninum í Fiskimannafelagnum, so kemur tað mær í ringt orð, og tí er tað so harmiligt, at slíkar ákærur bara verða slongdar út, uttan at hald er í teimum, sigur Marner Lisberg.

Kvittanirnar, sum Marner Lisberg leggur sum prógv, vísa, at teir báðir portugisarnir hava fingið ta hýru, sum teir sambært reiðaranum høvdu gjørt avtalu um framman undan.

Teir hava í veruleikanum fingið fyri tveir mánaðir, hóast teir bara vóru við skipinum í góðan mánað, so teir hava als einki at kæra um, sigur Marner Lisberg, reiðari.


P/F Suðringur
Reiðaravirki
FR-800 Tvøroyri

Tlf. +298 371740
Fax +298 372219
GSM +298 211740
e-mail: jen@olivant.fo

**Reciept:**

I Bruno Filipe de Oliveira Pimenta have received salary 1650EUR in cash 31-08-2010.

## Leivdir frá seinastu viku

Um vikuskiftið fleyt nakað av olju á Eystaru vág í Havn, men oljan kom ikki frá nøkrum skipi tann dagin.

Sløkkiliðið í Havn sigur, at eitt skip bunkraði eitt sindur yvir í seinastu viku. Oljan er tá farin inn undir bryggjuna og vísti seg aftur nú.

Nøgdin av olju, sum fór á sjógv í seinasu viku, var so mikið lítil, at einki arð gjørt við hana.

## Tikin beinanvegin

Leygarmorgunin steðgaði ein politibilur í Havn einum ungum manni, sum varð skuldsettur fyri at hava koyrt ávirkaður.

Tað vísti seg, at maðurin hevði verið í eini veitslu og hevði stolið ein bil. Hann hevði bara koyrt einar 100 metrar, tá ið hann varð tikin.

Maðurin er umframt rúsdrekkakoyring eisini skuldsettur fyri at hava stolið bilin.

## Á skaðastovuna eftir harðskap

Í einum bardaga í Havn leygarnáttina varð ein ungur maður sparkaður og sligin, so hann noyddist á skaðastovuna. Sambært politinum fekk maðurin ikki álvarsligan skaða.

Politiið veit, bæði hvør tann ungi maðurin er, og teir, sum eru lagdur undir at hava framt harðskapin.

Nú bíðar politið eftir, at álopni maðurin skal koma at geva frágreiðing, og so verður støða tikin til, um meira verður gjørt við málið.

## Bilførarin rýmdi

Um fimm tíðina sunnumorgunin rendi ein bilur á oynna niðast í R. C. Effersgøtu í Havn og koyrdi víðari inn í veggin beint við.

Áðrenn politiið kom, var bilførarin rýmdur úr bilinum, sum fekk stóran skaða eins og garðurin.

Tað eydnaðist ikki politinum tann morgunin at finna bilføraran. Nógv fólk er framvegis í býnum hesa tíðina ein sunnumorgun, og bilførarin kann vera farin upp í fjøldina í býnum.

Men politiið veit, hvør bileigarin er.



*Garðarnir fingu stóran skaða av bilinum, sum rendi á*
Mynd: Jens Kristian Vang